# Fýra flokkar manna løgtingið við 30 tinglimum

**Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur, ger viðmerkingar til veljarakanningina, sum Fynd hevur gjørt fyri www.portal.fo og Sosialin**

VELJARAKANNING
*Jógvan Mørkøre*

Í umfatandi veljarakanningini, ið varð gjørd í vikuni, fæst ein hóming, hvat ið vit kunnu vænta okkum av spenningi í einstøku valdømunum, nú fáar vikur eru til valið. Sambandsflokkurin stendur til at fáa eitt framúr gott val. Ikki bert tí at hann stendur til at gerast størsti flokkur, men serliga tí at hann klárar seg so avbera væl í einstøku valdømunum. Fólkaflokkurin má taka til takkar við bert trimum valdømisvaldum. Og teir smáu flokkarnir verða ikki umboðaðir, so tingið verður fyri fyrstu ferð, síðani lógin varð broytt í 1978, mannað við minni enn 32 tinglimum.

Góða hálið hjá Sambandsflokkinum.

Gongur sum spátt í kanningini, so fær Sambandsflokkurin 9 tinglimir, allir valdømisvaldir. Hann fær umboðan í øllum valdømum uttan í Sandoyar valdømi. Og fleiri staðni ikki bert tað eina umboðið, men tvey. Í Eysturoynni fær hann sum vant tvey umboð, og í Suðurstreymoy sum væntað somuleiðis tvey. Bumban hesaferð er, at hann tekur eisini bæði umboðini í Vágunum - og tað so ruddiliga. Vil tað væl við hjá honum, so fær hann eins og Javnaðarflokkurin tvey umboð í Suðuroy - sum Tjóðveldisflokkurin noyðist at lata. Tað er tætt ímillum hesar báðar, hvør ið eigur hin fjórða valdømisvalda í oynni. Hinvegin, so er tann valdømisvaldi í Norðoyggjum ikki so tryggur, tí tað er í kapping við Fólkaflokkin - og kanska Tjóðveldisflokkin - hvør ið skal hava hin fjórða valdømisvalda.

Rakar tíðir hjá Fólkaflokkinum?

Hjá Fólkaflokkinum skerst illa í kanningini. Trý valdømisvald er alt og uttan minsta møguleika at vinna tinglimin aftur - uttan sum eykavaldan - í Vágunum, Norðurstreymoy og Sandoy. Hinvegin so fær hann tríggjar eykavaldar uttan at noyðast at togast við aðrar flokkar um hesar, tí teir smáu koma ikki inn um tinggáttina upp á 3,7 %, og býtið millum hinar kappingarneytarnar lagar seg so, so eingin teirra fær lut í teimum eykavaldu. Hann hevur tó ein góðan møguleika at taka áttanda limin í Suðurstreymoy. Sum tað sær út í kanningini verður tað frá Javnaðarflokkinum, sum so bert fær ein valdømisvaldan í Suðurstreymoy - ella frá Tjóðveldisflokkinum, sum so fær tvey valdømisvald og ikki trý. Fólkaflokkurin hevur eisini ein góðan møguleika at taka fjórða valdømisvalda í Norðoyggjum, so flokkurin fær tveir av teimum fýra føstu tinglimunum í hesum valdøminum. Men so verður tað so, at hann fær bert tvey eykavald umboð afturat. So uppum seks tilsamans verður tað neyvan.

Hjá Tjóðveldisflokkinum kann fella báðar vegir.

Tjóðveldisflokkurin tykist somuleiðis at fáa eitt gott val. Hann hevur verið rættuliga støðugur í veljarakanningum og ligið um tey 26 prosentini. Sambært kanningini fær hann 8 valdømisvaldar og ongan eykavaldan. Hann hevur ein møguleika at bøta um hetta við at taka seg fram í Norðoyggum, so hann fær tvey valdømisumboð í hesum valdøminum. Ella kann hann kvinka samantalda úrslitið eitt sindur upp, so hevur hann ein góðan møguleika at fáa ein eykavaldan, so hann eins og Sambandsflokkurin fær 9 tinglimir tilsamans. Hinvegin so eru hin triði valdømisvaldi í Suðurstreymoy og tann valdømisvaldi í Suðuroy í vanda.

Javnaðarflokkurin má serliga hava eyguni eftir Suðurstreym.

Hjá Javnaðarflokkinum tykist mest sum alt avgjørt. Hann fær tvey valdømisvald í Suðuroy, men hevur ongan møguleika at fáa trý, sum tað onkuntíð fyrr hevur eydnast. Og so er hann rættuliga vísur í at fáa valdømisvald umboð í Norðoyggjum, Eysturoynni og Sandoy. Men samstundis tykist tað at vera sera trupult hjá honum at vinna valdømisvald umboð í Norðstreymoy og Vágunum, og annað umboðið úr Suðurstreymoy situr rættuliga ótrygt. Tað er í Suð-urstreymoy, at mesti spenningurin verður hjá Javnaðarflokkinum.

Sjálvstýrisflokkurin og Miðflokkurin røkka ikki upp um gáttina.

Við ávikavist 2,6 og 2,1 % koma hvørgin teirra inn. Hvørgin megnar at fáa valdømisvalt umboð nakrastaðni - tað er so langtífrá, at tað kann koma upp á tal. So vónin má setast til at røkka upp um tinggáttina upp á 3,7 % fyri at fáa lut í teimum eykavaldu. Sum tað sær út í kanningini, so verður tað ikki lætt, men sjálvandi, ein óvissa er altíð við slíkari kanning, hóast tey, ið svarað hava, eru mong. Eydnast øðrum ella báðum at vinna seg upp um gáttina, so broytir tað ikki myndina stórvegis millum teir stóru flokkarnar. Munurin verður, at fimm eykavald verða tilsamans í staðin fyri trý, so tingmannatalið kemur upp á 32 - sum vant, ber til at siga - í staðin fyri 30. Fyri samgongumøguleikarnar kann tað hinvegin vísa seg at fáa alstóran týdning.



*Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingar, ger viðmerkingar til veljarakanningina*

| | Løgting-val apríl ´98 | okt-99 | mar-00 | nov-00 | des-00 | feb-01 | apr-01 | sep-01 | nov-01 | mar-02 | apr-02 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fólkaflokkurin | 21,3 | 17,6 | 16,1 | 19,2 | 22,4 | 21,3 | 17,5 | 18,5 | 19,4 | 17,3 | 18,7 |
| Sambandsflokkurin | 18 | 23,3 | 21,9 | 23,3 | 22,8 | 18 | 21,2 | 23 | 20,4 | 23,8 | 27,8 |
| Javnaðarflokkurin | 21,9 | 24,1 | 27,3 | 22,2 | 21 | 21,9 | 24,4 | 26,4 | 27,5 | 24,3 | 22,9 |
| Sjálvstýrisflokkurin | 7,7 | 5 | 6 | 5,4 | 3,8 | 7,7 | 5,4 | 4,8 | 2,7 | 4,2 | 2,6 |
| Tjóðveldisflokkurin | 23,8 | 25,5 | 24,4 | 25,3 | 26 | 23,8 | 25,9 | 24,6 | 26,6 | 25,1 | 25,9 |
| Kr. Fólkaflokkurin | 2,5 | 0,9 | - | 0,6 | 0,6 | 2,5 | 0 | 0,5 | 1,4 | - | - |
| Miðflokkurin | 4,1 | 2,9 | 4,3 | 3,2 | 3,4 | 4,1 | 4,9 | 2,2 | 1,9 | 5,3 | 2,1 |
| Verkamannafylkingin | 0,7 | 0,8 | - | 0 | 0 | 0,8 | 0 | 0 | 0 | - | - |

***Talva: Býtið av atkvøðum og valdømisvaldum upp á valdømi og fyri landið alt.***

| | | Valdømi | | | | | | | Landið alt | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | Norðoyggjar | Eysturoy | N. Streymoy | S. Streymoy | Vágar | Sandoy | Suðuroy | Atkv. % | Valdømisvald | Eykavald | Valdømisvald og eykavald. |
| Fólkaflokkurin | % | 27,7 | 18,8 | 17,4 | 19,9 | 15,3 | 18,4 | 7,1 | 18,7 | | | |
| | Vald | 1 | 1 | | 1 | | | | | 3 | 3 | 6 |
| Sambandsflokkurin | % | 17,4 | 33,6 | 30,7 | 23,1 | 47,4 | 20,2 | 33,4 | 27,8 | | | |
| | Vald | 1 | 2 | 1 | 2 | 2 | | 1 | | 9 | 0 | 9 |
| Javnaðarflokkurin | % | 20,9 | 21,1 | 18,6 | 20,8 | 14,7 | 30,4 | 40,8 | 22,9 | | | |
| | Vald | 1 | 1 | | 2 | | 1 | 2 | | 7 | 0 | 7 |
| Sjálvstýrisflokkurin | % | 8,1 | 2,6 | 1,8 | 2,0 | 1,4 | 0,6 | 0,5 | 2,6 | | | |
| | Vald | | | | | | | | | 0 | 0 | 0 |
| Tjóðveldisflokkurin | % | 24,0 | 22,5 | 28,9 | 31,5 | 17,4 | 30,1 | 17,0 | 25,9 | | | |
| | Vald | 1 | 1 | 1 | 3 | | 1 | 1 | | 8 | 0 | 8 |
| Miðflokkurin | % | 1,9 | 1,4 | 2,7 | 2,6 | 3,8 | 0,3 | 1,1 | 2,1 | | | |
| | Vald | | | | | | | | | 0 | 0 | 0 |
| Valdømisvald tils. | | 4 | 5 | 2 | 8 | 2 | 2 | 4 | | 27 | 3 | 30 |



# Fólkaflokkurin hevur mist takið á høvuðsstaðnum

**Tjóðveldisflokkurin er framvegis størstur, og Sambandsflokkurin endurvinnur umdømisvalda mannin, sum teir mistu fyri fýra árum síðani**

VELJARAKANNING Í SUÐURSTREYMOY
*Jóannes Hansen*

Fyri fýra árum síðani syrgdi Høgni Hoydal fyri, at tjóðveldisflokkurin fekk tríggjar av teimum átta umdømisvaldu umboðunum í nógv tí fólkaríkasta valdøminum. Veljarakanningin í hesi vikuni boðar frá, at tjóðveldisflokkurin framvegis fer at eiga trý umboð í Suðurstreymoy. Um Høgni Hoydal fer at fáa eins nógvar persónligar atkvøður, sum hann fekk, tá hann fyri fýra árum síðani setti nýtt met, fáa vit at síggja. Men tað er trongt aftan fytri formannin, og tí kann tað hugsast, at atkvøður, sum fyri fýra árum síðani fóru til Høgna Hoydal, nú kunnu fara til onkran av hinum.

Framgongdin hjá sambandsflokkinum hevur við sær, at hann fær tveir umdømisvaldar tingmenn. Fýra tey síðstu árini hevur Lisberth L. Petersen verið umdømisvald, meðan Heðin Mortensen hevur verið eykavaldur.

Javnaðarflokkurin tykist skula varðveita bæði síni umboð, men tað er bara eitt prosent niður til fólkaflokkin. Á valinum fyri fýra árum síðani áttu hesir báðir flokkarnir neyvt ta somu undirtøkuna í Suðurstreymi.





*Annaðhvørt Óli Breckmann, sum hevur verið umdømisvaldur síðani 1974, ella landsstýrismaðurin Bjarni Djurholm, sum var umdømisvaldurbæði í 1994 og í 1998, verður sambært veljarakanningin hjá Portalinum og Sosialinum ikki umdømisvaldur hesa ferð. Men alt bendir á, at flokkurin fer at fáa í hvussu so er ein eykavaldan í Suðurstreymi*

### Trongt hjá fólkaflokkinum

Fólkaflokkurin hevur ofta verið størsti flokkur í Suðurstreymi. Tað hevur sást aftur í tingmannatalinum. Í 1988 og í 1990 átti fólkaflokkurin trý umboð í Suðurstreymi.

Sambært kanningini í hesi vikuni fer fólkaflokkurin bara at fáa ein umdømisvaldan tingmann í Suðurstreymi. Tað vil við øðrum orðum siga, at formaðurin í tingbólkinum, Óli Breckmann, sum hevur verið umdømisvaldur síðani 1974, ella landsstýrismaðurin Bjarni Djurholm, sum var umdømisvaldurbæði í 1994 og í 1998, ikki verður umdømisvaldur hesa ferð. Men alt bendir á, at flokkurin fer at fáa í hvussu so er ein eykavaldan í Suðurstreymi.

Tað hevur verið mett, at fleiri á fólkaflokslistanum fóru at hava møguleika at verða vald. Spurningurin er so, hvørjar skreytir t. d. fyrrverandi býráðsformaðurin og løgtingsmaðurin Poul Michelsen og býráðslimurin Bjarti Mohr fara at gera.

## Fakta um kanningina

Tað er samtakið FYND sum hevur gjørt veljarakanningina fyri Sosialin og www.portal.fo.

Kanningin er gjørd mikukvøldið og hóskvøldið. Næmingar á Klaksvíkar HF-skeiði hava gjørt kanningina í hølunum hjá Telebúðini hjá Føroya Tele í Klaksvík.

Spurd eru um 400 fólk í hvørjum valdømi, um 2.800 fólk tilsamans. Hetta er sostatt størsta veljarakanningin, sum nakrantíð er gjørd í Føroyum, og hon er eisini sermerkt á tann hátt, at fólk eru spurd í øllum valdømum við tí endamáli at vísa, hvussu umboðanin verður á tingi.
Tað er Jóannes Hansen, samfelagsfrøðingur, sum hevur staðið fyri kanningini. Tølini eru vigað og korrigerað av FYND.

# Jørgen er á veg út

**Fyri fyrstu ferð nakrantíð sær tað út til, at Sambandsflokkurin fer at fáa báðar tingmenninar í Vágum**

VELJARAKANNING Í VÁGUM
*Jóannes Hansen*

Á fólkatingsvalinum í november vóru ábendingar um tað. Tá varð sagt, at fólkatingsval og løgtingsval kundu illa sammetast. Nú staðfestir veljarakanningin, at tað eru rættuliga góðir møguleikar fyri tí. Vágamenn geva sambandsflokkinum so mikið dygga undirtøku, at flokkurin væl og virðiliga – um val hevði verið í hesi vikuni – hevði fingið báðar teir umdømisvaldu tingmenninar.

Tað hevur hann ongantíð áður havt, men tað hevur onkra ferðina verið heilt tætt við. Síðsta dømið um hetta var í 1978, tá sambandsflokkurin undir leiðslu av Paula Ellefsen bara restaði seks atkvøður í at fáa bæði umboðini.

Marius Dam hevur seinasta valskeiðið umboðað Vágarnir í løgtinginum. Hesa ferð hevur flokkurin trý nøvn á listanum. Umframt Marius Dam eru tað fyrrverandi tingmaðurin Sune Jacobsen í Sørvági og Gunnar K. Nattestad, sum er ættaður úr Miðvági, og sum býr í Sandavági.

At sambandsflokkurin tykist vera so drúgvur í Vágum bendir á, at tað verður torført hjá Jørgeni Niclasen at endurvinna tingsessin, sum hann vann í 1998, og sum Jóanis Nielsen í Sandavági hevur røkt, síðani Jørgen gjørdist landsstýrismaður í fiskivinnumálum.

Nógvu tey seinnu árini hevur tað verið soleiðis, at umframt sambandsflokkin og fólkaflokkin hevur tað verið javnaðarflokkurin, sum hevur telvast um teir báðar umdømisvaldu sessirnar. Nú hevur tjóðveldisflokkurin yvirtikið næstfremsta plássið. Men hann er sambært kanningini langt frá at vinna umboðan fyri Vágarnar. Seinast tjóðveldisflokkurin átti umboð í Vágum var í valskeiðnum 1954-1958. D. P. Danielsen, sum eisini hevði sitið á tingið frá 1950-1954, var valdur á ting fyri Vága valdømi tá.



*Veljarakanningin bendir á, at Jørgin Niclasen er á veg úr tinginum, tí Sambandsflokkurin stendur til at fáa báðar tingmenninar í Vágunum*

Jørgen Niclasen:

# –Vit hava ikki klárað okkum nóg væl

**Jørgen Niclasen tekur ikki úrslitið í Vágoynni persónliga, men hann heldur polariseringin hevur givið útslag**

VELJARAKANNING
*Heri á Rógvi*

Úrslitið í Vágoynni í veljarakanningini er øðrvísi enn tey flestu kanska høvdu roknað við frammanundan. Úrslitið gjørdist, at Sambandsflokkurin fekk nærum aðruhvørja atkvøðu í Vágoynni. Sambandsflokkurin fekk 47,4%. Fólkaflokkurin eigur sum nú er ein tingmann í Vágoynni. Jørgen Niclasen var við seinasta val valdur á ting umboðandi Fólkaflokkin og Vágoynna. Í veljarakanningini fær Fólkaflokkurin 15,3% av atkvøðunum í Vágoynni, og hetta røkkur langt frá til ein valdømisvaldan tingmann.

Jørgen Niclasen sigur, at úrslitið skyldast polariseringina millum loysing og samband.

– Hetta valið er gjørt upp til eitt val millum loysing og samband, og hetta sæst aftur her eins og til fólkatingsvalið, sigur Jørgen Niclasen.

Sjálvur heldur Jørgen Niclasen einki um hesa uppgerð millum loysing og samband. Hann væntar samstundis, at Fólkaflokkurin fer at fáa eitt betri úrslit enn veljarakanningin vísir.

–Vit fara at seta øll segl til komandi tíðina. Vit hava ikki klárað nóg væl, men eg rokni við, at vit fara at klára okkum betur enn sagt verður, sigur Jørgen Niclasen.

Hann sigur seg ikki taka úrslitið persónliga. Orsøkin hevur meira við polariseringina at gera, heldur hann. Fólkaflokkurin hevur havt tingmann í Vágoynni í nógv ár. Jørgen Niclasen heldur, tað hevur bert verið eingin fólkafloksmaður á tingi fyri Vágoynni í tvey ár av teimum seinastu tjúgu.

Jørgen Niclasen heldur eisini, at ein orsøk til úrslitið til kanningina kann vera, at sambandssinnaðir fólkafloksveljarar heldur velja Sambandsflokkin enn Fólkaflokkin.